## Hjartafelagið

Aðalfundur felagsins verður týsdagin 29. februar kl. 19.30 á Hotel Hafnia.

Skrá samb. lógum felagsins.

Mál, sum limir vilja hava viðgjørt á aðalfundinum, mugu verað nevndini í hendi í seinasta lagi 8 dagar áðrenn aðalfundin.

Á aðalfundinum heldur Heðin Thomsen yvirlækni, fyrilestur um kolesterol og hjartasjúkur, og Mariann Patursson kostráðgevi, um heilsugóðan kost.

**Nevndin**

Hjartafelagið, Postboks 3120, 110 Tórshavn

## Skrivstovufólk til Føroya Jarðarráð

Eitt starv sum skrivstovufólk á Føroya J arðarráð er leyst at søkja.

Arbeiðsuppgávan er avgreiðsla og vanligt skrivstovuarbeiði.

**Førleikakrøv:**

- Skrivstovuútbúgving
- duga væl at skriva føroyskt
- hava kunnleika til nýtslu av edv á brúkarastøði

Starvið verður lønt í 9. lønarflokki sambært sáttmála millum Starvsmannafelagið og Fíggjarmálastýrið.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Jóannes Dalsgarð, stjóra, tlf. 311180.

Umsókn við prógvum, viðmælum o.ø. skulu vera skrivstovu ráðsins í hendi seinast 21. februar 2000.

**Føroya Jarðarráð**
R.C. Effersøesgøta 4
Postrúm 50 110 Tórshavn

## Reyði krossur Føroya

Sorgarlinjan hjá Reyða Krossi Føroya svarar allar dagar frá kl. $17^{00}$ til $23^{00}$

☎ 212380

# FLOGFRAKT/ SJÓFRAKT



SAFARI TRANSPORT

GREIÐA ALLAN FLUTNING & ØLL PAPPÍR

Tlf. 31 22 22

**Tórshavnar Kommunala Starvs- & Tænastumannafelag**

## Aðalfundur

verður týsdagin 29. feb. kl. 19.30 á Hotel Hafnia.

Skrá sambært lógum felagsins.
Til viðgerðar: Uppskot um lógarbroyting.

**Nevndin**

## Eysturoyar Javnaðarfelag

Aðalfundurin er útsettur til mikukvøldið 16. februar kl. 20 og verður í bygdasalinum í Ítróttarhøllini á Skála.

Við á fundinum verða Jóannes, Henrik, Vilhelm og Dan.

**Nevndin**

## Dagrøktarleiðari

Søkt verður eftir leiðara til dagrøktina á Eiði.

Skrivlig umsókn verður at senda til Eiðis Kommunu innan 21. februar.

Krav: Námsfrøðilig útbúgving.

Nærri fæst at vita á tlf. 423012.

**Eiðis Kommuna**
470 Eiði

## Reingerðarfólk til posthúsið í miðbýnum í Tórshavn

Søkt verður eftir einum fólki at gera reint á posthúsinum í miðbýnum í Tórshavn.

Arbeiðstíðin er sett til 7 1/2 tíma um vikuna. Byrjast skal 01. mars 2000. Arbeiðið kann gerast áðrenn kl. 09.30 á morgni ella eftir kl. 18.30 mánadag til fríggjadag.

Løn og setanarviðurskifti sambært sáttmála millum Føroya Landsstýri og Føroya Postfelag.

Nærri fæst at vita mán.-frí. á telefon 31 55 62 lokal 138 (beinleiðis tel.).

**Postverk Føroya**

sosialurin sosialurin sosialurin -har tað hendir

## Varðaleiðari

Innan Almanna- og Heilsumálastýrið og stovnar undir tí, við fyribils tænastu á Bústovninum og Sambýlinum á Rúnarvegi í Runavík, er eitt tænastumannastarv sum varaleiðari leyst at søkja frá 1. apríl 2000 ella eftir nærri avtalu.

Talan er um eitt fulltíðarstarv, sett eftir sáttmála ímillum Fíggjarmálastýrið og Føroya Pedagogfelag, lønt í lønarflokki 19 + viðbót.

Bert fólk við pedagogútbúgving kunnu søkja starvið.

Bústovnurin og Sambýlið á Rúnarvegi er heim hjá 12 fólkum við ymiskum tørvi á hjálp og vegleiðing.

Tað verður væntað av varaleiðaranum , at viðkomandi kann skapa trivna, kann átaka sær nýggjar pedagogiskar avbjóðingar, kann samstarva, hevur hugflog, kann seta greiðar linjur og er førur fyri at yvirtaka uppgávur fyristøðufólksins, tá hesin er burturstaddur.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til fyristøðufólkið á tlf. 448424.

Skrivlig umsókn við prógvi, viðmæli v.m. skal vera okkum í hendi í seinasta lagi 28. februar 2000 og skal sendast til:

**Bústovnurin**
Rúnarvegur
Att.: Fyristøðufólkið
FO-620 Runavík

## Landsfundur *Miðflokkurin*

hevur landsfundur leygardagin 26. februar kl. 10.00 á Tórshavnar Sjómansheimi.

Gestatalari á fundinum verður Arnfinn Clementsen, pastor í Karisma Senter í Stavanger. Arnfinn Clementsen er stigtakari og leiðari av tiltakinum "Norge tilbake til Gud".

**Floksleiðslan**

FØROYA PEDAGOG FELAG

## Aðalfundurin í Føroya Pedagogfelag útsettur

Aðalfundurin, sum lýstur var at verða

**leygardagin 19. februar 2000**

er útsettur í nakrar vikur.

Lýst verður nærri nær aðalfundurin verður.

**Nevndin**



## Stuðulspedagogur

Søkt verður eftir 1 stuðulspedagogi til 3 ára gamalt barn í Klaksvík.

Arbeiði hjá stuðlinum verður at stimbra barnið málsliga og sosialt og annars at gera dagin innihaldsríkan saman við barninum.

Arbeiði verður gjørt í samstarvi við familjuna og barnaverndina.

Arbeiðstíðin er 20 tímar um vikuna og fyribils til 30.07.2000.

Ynskiligt er, at tann, ið settur verður, hevur hóskandi fakliga útbúgving ella royndir.

Setan sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Fíggjarmálastýrið.

Nærri upplýsingar kunnu fáast við at venda sær til Stuðulsstovuna tlf. 456557.

Umsøknir saman við avritum av prógvi vera at senda til:

**Barnaverndarnevndina**
Klaksvíkar Kommuna
Postboks 2, 700 Klaksvík
í seinasta lagi tann 26. feb. 2000

**Dr. Ingridar Meinigheits Barnagarður søkir**

## Pedagog

til 1. august í ár.

Starvið er 30 tímar á eini stovu við 20 børnum í 3 til 7 ára aldri. Tað sum dentur verður lagdur á er, at tú hevur umsorgan fyri barninum og dugir væl at samstarva.

Løn sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Føroya Landsstýri.

Umsókn við avriti av prógvi og møguligum viðmælum skal verða stovninum í hendi áðrenn 1. mars.

Ynskir tú at vita meira um starvið, kanst tú ringja tlf. 312253.

**Dr. Ingridar Meinigheits Barnagarður**
J. Paturssonar gøta 13 • 100 Tórshavn

## Ogn í Vestmanna til sølu

Um hóskandi boð fæst, eru sethús (trappuhús) á ovara vegi til sølu. Húsið er bygt í 1981, og er í tveimum hæddum.

Sovuhædd: køkur, stova, wc, gongd, durur og kjallari/fýrrúm.
Loft: Hjúnarúm, dupultkamar, kamar, bað og gongd.
Útsýnið er yvir alla bygdina.
Grundøkið er 1030 $m^2$.

Áhugað kunnu ringja **tlf. 424666**

## Frá S&K-felagnum

Aðalfundur felagsins verður í hølum Føroya Arbeiðarafelags, Tjarnardeild 5, Tórshavn, leygardagin 26. februar 2000 kl. 15.00 við hesari dagsskrá:

1. Frásøkn formansins frá farna ári
2. Roknskapur til góðkenningar
3. Val av tveimum nevndarlimum og tveimum tiltakslimum
4. Val av formanni
5. Lógarbroytingar
6. Innkomin uppskot
7. Ymiskt

Uppskot til viðgerðar á aðalfundinum skulu skrivliga vera felagnum í hendi 8 dagar áðrenn aðalfundin.

**Nevndin**

## Aðalfundurin

hjá **Arbeiðarafelagnum Lýsing** verður fríggjadagin 25. februar.

Skrá sambært lógum felagsins.

Tíð og stað verða lýst seinni.

**Nevndin**

## M/B Váðaklettur
### KG 96, 19,61 BRT

Fiskiloyvi 4A til sølu um hóskandi boð fæst.

Nærri upplýsingar fáast frá Victor Nielsen tlf. 455522.

**Føroyabók**
*Skrásett grannskoðaravirki*
Vágstún 2
FO-700 Klaksvík
Tlf. 455522 - 281522

Sambært grein 28 í høvuðssamtyktini verður lýst til

## Umboðsmannaval

**Í sjúkrakassanum fyri Skála Læknadømi tann 18. mars 2000.**

2 umboð fyri Skála kommunu og 1 umboð fyri Elduvíkar kommunu skulu verða vald.

Uppskot við minst 6 valevnum skulu vera Sjúkrakassanum í hendi innan 12. mars.

**Sjúkrakassi Skála Læknadømis**
490 Strendur • telefon 449212

**Starv**

## Mekanikari til bilverkstaðið

Hervið verður søkt eftir mekanikara til at seta í fast starv á bilverkstaðnum á Hjalla skjótast gjørligt.

**Arbeiðsuppgávurnar á bilverkstaðnum**

Høvuðsuppgávan hjá bilverkstaðnum er at umvæla, samskipa og menna tekniska viðlíkahaldið av lastbilum, bussum o.ø. koyriútbúnaði hjá fyritøkuni, sum hevur 15 stórar lastbilar, 9 stórar bussar, 8 vørubilar og annan útbúnað.

Á bilverkstaðnum eru íalt 8 fólk:

1 leiðari, 4 lastbilamekanikarar, 1 goymlsuvørður og 2 lærlingar

Aðrar høvuðsuppgávur eru:

- Tryggja ein støðugan rakstur av koyriútbúnað-inum
- Seta upp viðlíkahaldsmannagongdir- og ætlanir
- Gera ætlanir um størri viðlíkahaldsarbeiði
- Hava dagligt eftirlit við koyriútbúnaðinum, herundir samstarv við Bileftirlitið, verkstøð og aðrar myndugleikar

**Starvið fevnir um**

Mekanikarin skal verða við til at tryggja, at koyriútbúnaðurin er í so góðum standi sum gjørligt, og at veita leiðsluni eina skilagóða rakstrarfyrisiting.
Aðrar høvuðsuppgávur hjá mekankaranum eru at vera við til at:

- Tryggja at trygdin á øllum koyriútbúnaðinum er í samsvari við formlig og teknisk krøv
- Leypandi meta um viðlíkahaldstørvin á koyriútbúnaðinum
- Tryggja gott samstarv við myndugleikar og aðrar samstarvsfelagar
- Vanligt dagligt viðlíkahald á øllum lastbilum, bussum o.ø. koyriútbúnaði

**Førleikakrøv**

- Lastbilamekanikari ella tilsvarandi mekaniska útbúgving
- Koyrikort til trailara er ein fyrimunur
- Prógv í sveising er ein fyrimunur
- Arbeiða sjálvstøðugt og hava lætt við at samstarva
- Góðan røkjuskap

**Setanartreytir**

Setanartreytir verða sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og avvarandi yrkisfelag.

**Umsóknir**

Umsóknir skulu sendast til:

***Strandfaraskip Landsins***
att. Starvsfólkadeildin
Boks 88
FO-110 Tórshavn

og skulu vera fyritøkuni í hendi í seinasta lagi 25. februar 2000.

Nærri upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til Heðin Mortensen, leiðara á bilverkstaðnum tlf. 34 30 00 lokal 146, ella e-post: hem@ssl.fo

*Strandfaraskip Landsins er ein landsfyritøka undir Vinnumálastýrinum / Samskiftisdeildini.*

*Høvuðsuppgávan hjá fyritøkuni er at lúka landsins tørv á innanlanda fólka- og farmaflutningi, og skal fyritøkan í so stóran mun sum gjørligt rekast á handilsligum støði. Fólka- og farmaflutningurin setir stór krøv um eina góða kundatænastu, herundir trygd, reglusemi og skjótleika.*

*Árliga rakstrarætlanin hjá Strandfaraskipum Landsins javnvigar við yvir 100 mió. kr. Talið á starvsfólkum svarar til 180 fulltíðarstørv, herav umleið 155 operatørar. Talið á flutningsanleggum er 12 skip, 40 bussar og 15 lastbilar. Flutningsuppgávurnar fevna um alt landið.*

**STRANDFARASKIP LANDSINS**